# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Umheimurin flennir at okkum, tí at vit ikki eru før fyri at skipa landinum eina stjórn*

*(belgiski uttanríkisráðharrin)*

# Her liggja loyniligir upplýsingar um týning

**Skjøl við upplýsingum um 17,5 milliónir fólk kunnu svara nógvum spurningum um fólk, sum endaðu í týningarlegunum hjá Nazitýsklandi**

Síðani seinasta mikludag hava søgufrøðingar og onnur havt atgongd til tað ovurstóra skjalasavnið í Bad Arolsen í Týsklandi. Og áhugin er stórur, tí í hesum savninum er nógv av tí, sum nazistarnir skrivaðu niður um fólk, sum fóru í týningarlegurnar, og tað, sum hendi teimum.

Síðani seinna heimsbardaga hava ellivu lond havt umsjón við teimum umleið 50 milliónum skjølunum í Bad Arolsen, men nú hava londini skrivað undir eina avtalu, sum ger, at søgufólk og avvarðandi hjá fólki, sum vóru í týmningarlegunum, kunnu fáa atgongd til skjølini.

Søgufrøðingar siga, at í skjølunum eru nógvar áhugaverdar, men samstundis óhugnaligar upplýsingar um fólk, sum vóru send í týningarlegurnar, og hvat hendi teimum har. Millum annað vænta søgufólk at fáa upplýsingar um trælaarbeiðið í legunum og læknafrøðiligar kanningar og royndir, sum nazistarnir brúktu nógvar fangar til.



*50 milliónir skjøl liggja í skjalagoymsluni í Bad Arolsen*
*Mynd: Reuters*

# Belgia framvegis neyðstjórn

**Belgiumenn kunnu ikki semjast um at skipa stjórn, so gamla stjórnin heldur fram - av neyð**

- Fólk í øðrum londum flenna at okkum, tí vit ikki kunnu semjast um at skipa landinum eina stjórn, sigur belgiski uttanríkisráðharrin, Karel de Gucht. Hann skuldi frá aftan á valið í summar, men er framvegis ráðharri, tí flokkarnir kunnu ikki semjast um at skipa nýggja stjórn.



*Guy Verhofstadt skuldi frá í summar, men er framvegis forsætisráðharri í Belgia*

Valið í Belgia var10. juni. Kristiligi demokratiski flokkurin í tí flamska partinum av landinum gjørdist landsins størsti, men allar royndir at skipa stjórn saman við borgarliga flokkinum í hinum partinum av landinum hava verið til fánýtis, og um vikuskiftið legði Yves Leterme, floksformaður, kongin.

Avgerð hansara fekk Albert kong at senda boð eftir Guy Verhofstadt, sum var forsætisráðharri undan valinum í summar, og sum hevur staðið fyri einari umsitingarstjórn síðani valið. Ørindini hjá kongi vóru at biðja stjórnina halda fram, so landið ikki endar í stjórnarloysi. Verhofstadt játtaði.

## Iran gavst longu í 2003 við kjarnorku

Í USA roynir tann demokratiski flokkurin at fáa stjórnina hjá George W. Bush, forseta at broyta kós í politikkinum mótvegis Iran, eftir at tað er komið fram, at iranar sleptu sínum kjarnorkuætlanum longu í 2003, og at teir ongantíð hava tikið arbeiðið uppaftur. Upplýsingarnar stava frá frágreiðingum hjá teimum amerikonsku fregnartænastunum. Viðhaldsmenn hjá forsetanum halda kortini uppá, at iranar kunnu framvegis fáa sær kjarnorkuvápn.

## STUTT SAGT

### Irakar venda heimaftur

Muslimski hjálparfelagsskapurin Reyði Hálvmáni sigur, at teir seinastu tríggjar mánaðirnar eru 28.000 irakar komnir aftur til Irak úr øðrum londum. Talið er heldur minni enn tað, sum stjórnin í Bagdad kunngjørdi fyri nøkrum døgum síðani, men gongdin vísir tó, at tað ber til hjá flóttafólkinum venda aftur, skrivar AP. Sambært ST eru nógv tey flestu komin aftur eftir at hava verið í útlegd í Sýrialandi. Men enn eru nógvir irakar í Sýrialandi, tí hildið verður, at umleið 1,4 mió. fólk eru flýdd úr Irak til Sýrialands síðani innrásina í 2003.

### Løgdu arbeiðið niður

Umleið 240.000 námsarbeiðsmenn í Suðurafrika fóru ikki til arbeiðis í morgun fyri at mótmæla teimum nógvu óhappunum og teirri vánaligu útgerðini í námunum. Menninir, sum hava lagt arbeiðið niður, arbeiða í diamant-, platinium-, gull- og kolanámum, og roknað varð við, at umleið 40.000 teirra fóru at taka lut í einari mótmælisgongu í Johannesburg á middegi í dag. Fakfelagið hjá námsarbeiðsmonnunum sigur, at meiri enn 180 menn hava latið lív í námsvanlukkum í Suðurafrika higartil í ár. Tær flestu vanlukkurnar hava verið í gullnámunum, og er orsøkin helst tann, at námsleiðslurnar leggja størri trýst á arbeiðsmenninar, nú prísurin á gulli er góður.

### Apur minnast væl

Ein roynd á lærda háskúlanum í Kyoto í Japan vísir, at sjimpansur hava minst líka gott minni sum fólk. Serfrøðingar lærdu fyrst nakrar apur at telja upp í tíggju. Síðani var ein roynd millum apurnar og nakrar studentar, har nøkur tøl stóðu á einum skíggja eina lítla løtu, og so skuldu luttakararnir siga, hvar á skíggjanum tey ymsu tølini stóðu. Royndin vísti, at apurnar vunnu næstan hvørja ferð, skrivar Reuters úr Kyoto.